**Í komandi blaði verður ummæli av ársins nýggjárskonsert, har hugt verður nærri at tónlistarliga partinum av stóra tiltakinum**

honum og peika og teska. Hetta er óivað fyrstu ferð í fleiri ár, at fólk fáa møguleikan at síggja frálíka troubadurin framføra, og spenningurin er stórur.

Høvuðspersónurin letur sum einki og setur seg friðarliga niður á ein av aftaru stólunum í salinum, og bíðar til, at konsert byrjar.

----------

So byrjar formligi parturin, sum verður sjónvarpssendur. Løgmaður lýsir tøgn í tríggjar minuttir, og tað hevur sjáldan verið so friðarligt millum so mong so leingi. Men tøgnin verður móti endanum brotin, tá onkur ikki longur fær hildið sær og hostar harðliga og hart.

So fer tónleikurin í gongd, og í hvørjum steðgi sæst Poul Jákup renna runt sum fluga í fløsku. Hann missir knappliga ein bunka av nótum, sum hann á øllum fýra má savna saman aftur. Nú gerst tað ov heitt fyri spelandi samskiparan, og hann fer úr klædningsjakkanum.

Tónleikurin gongur við fullari ferð, og eingin ivi er um, hvør stjørnan er. Eftir at dupultkvartettin í Ebenezer hevur brillierað, er Ernst Sondum Dalsgarð kongurin í Norðurlandahúsinum, og sum ein rættur Don Juan við síðum hári forførir hann alt og øll. Umframt operarøddina hevur hann sjarmuna og útstrálingina, sum tryggjar honum stjørnustatus. Í einum steðgi kemur hann troyttur út í kafeteriuna í forhøllini. Hann sigur seg vera svangan og tystan, og í einum slúkar hann eina sodavatn við onkrum aftur-við. Hann tuskar backstage, og lítla løtu seinni er hann aftur á palli.

Meðan Ólavur Jakobsen præsenterar næsta stykki, og klassiski tónleikurin frá symfoniorkestrinum fyllir høllina, stendst ósemja millum SVF manningina úti í forhøllini. Øssur vil hava greiðu á, um pengaligа ískoytið frá landsstýrinum er íroknað í milliónaupphæddina á skerminum. Skjótt verður semja, eftir at Sigrun Brend hevur ræssonerað seg fram til, at milliónirnar frá landsstýrinum ikki eru millum tær fimm milliónirnar, vit higartil eru komin upp á.

Symfoniorkestrið heldur fram við at bergtaka, í øllum førum fyri ein amatørlurtara. Ein fyrrverandi strúkari í symfoniorkestrinum heldur í steðginum fyri, at mistøkini eru ov nógv og tónlistarliga dygdin ov vánalig. Meðan summi krympa tærnar og snerkja, sita onnur við tárum í eygunum og njóta himmalska tónleikin. Munur er á monnum.

Sum heild tykist alt ganga, sum tað skal, og Tórður Mikkelsen hevur enntá stundir til eitt prát. Eingin panikkur, og fyrireikarar tykjast hava tamarhald á stóra tiltakinum.

So er klassiski tónleikurin frá symfoniorkestrinum liðugur, og konubrotið Sigrid Sivertsen framførir saman við barnakórinum Dropar. Kári Sverrisson foldar seg síðani út saman



*Dirigenturin hjá Føroya Symfoniorkestri og hálvi føroyingurin Bernharður Wilkinson leikaði í sunnukvøldið. Entusiasman og hugurin lýsir, tá Bernharður er í hopla*

við hinum báðum í Enekk, áðrenn Teitur, Eivør og Kári p koma á pallin, og fólk koma rennandi úr forhøllini innaftur í høllina. Tey trý sjarmera seg inn í hjørtuni á áhoyrarum, og fagnaðurin og lógvabrestirnir vilja ikki steðga, tá tey eru liðug. Stjørnutrioin kemur innaftur á pallin, men vit áhoyrarar fáa ikki tað eykanummarið, vit høvdu vónað.

Síðani kemur Aldubáran við Karl Martini Samuelsen og Annu Mariu Olsen, og so endar tiltakið við stóru finaluni, har øll eru á palli.

-----------

Eftir tiltakið tykjast andlitsbrøgdini tala fyri seg. Øll smílast, og Teitur kann ikki halda sær og hálsfevnir Suna Vinther, sum seinastu dagarnar hevur verið atypiska celebrity-stjørnan í føroysku fjølmiðlunum. Eitt lítillátið, sympatiskt og stórt menniskjað. Gissur, Poul Jákup, sjónvarpsfólk, løgmaður, mentamálaráðharrin, tónlistafólk skifta orð og frøðast.

Men millum smílandi andlitini skundar ein stygg-ur maður við guitara á baki sær avstað. Øll vilja hálsfevna og heilsa uppá fólkakæra troubadourin, men hann er einki við uppá at steðga á. Kári P hevur leverað vøruna, fólk vilja sýna honum takksemi, men hann er einki við uppá at hoyra lovsongsorð. Hann sleppur sær skjótt út í myrkrið og illfýsna veðurlagið.

Vit onnur fara nakað seinni aftaná út í bilarnar. Glað fyri eina tónlistarliga uppliving av teimum stóru, og mitt í sorgini eru vit eisini glað fyri, at smáu oyggjarnar í Norðuratlantshavi eisini kunnu luttaka í hjálpini til neyðstøddu offrini í Suðurasia. Endaliga úrslitið av innsavningini gjørdist slakar seks milliónir. Ófført.

Kvøldsins vísdómsorð átti indiska Kalpana, sum í sjónvarpinum heitti á føroyingar um at halda fram við hjálpini. Spurningurin er so, um talan er um eitt eingangsflipp, ella um globala samvitskan og solidariteturin fer at halda fram.

Myndir:
Jens Kristian Vang



*Frálíka barnakórið, Dropar, sang tríggjar sangir eftir norðmannin, Hans Inge Fagervik*

Reaktiónir á næstu síðu